# Havnin við í Earth Hour

ORKUSPARING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið 28. mars verður ljósið sløkt í miðbýnum í Havn og á Norðasta horni í ein tíma millum klokkan 20.30 og 21.30.

- Hetta, so høvuðsstaðurin - saman við 37 øðrum høvuðsstøðum kring heimin - kann geva umhvørvi og veðurlagsbroytingum ans, sigur Tórshavnar kommuna í tíðindaskrivi.

Átakið, sum eitur »Earth Hour«, hevur góða undirtøku um allan heim. Tað byrjaði í Sydney í Avstralia fyri tveimum árum síðani, og í fjør vóru yvir 30 lond, 20.000 virki og milliónir av menniskjum við.

Í ár verður talið væntandi meira enn tvífaldað, og Havnin telist millum 38 høvuðsstaðir, sum eru við – teirra millum London, Beijing, Rom, Moskva, Athen, Buenos Aires, Istanbul, Keypmannahavn, Manilla, Bruxelles og Helsinki.

**Vilja hava borgaran við**

Samstundis, sum Tórshavnar kommuna gongur undan í tiltakinum við at sløkkja ljósið á Ráðhúsinum og gøtuljósini í miðbýnum og á Norðasta Horni, verður mælt borgarunum og øðrum at gera tað sama henda tíman leygarkvøldið 28. mars.

Tórshavnar kommuna skjýtur upp, at hesin eini tímin kann brúkast til at skapa hugna, og er stjørnuklárt, er Norðasta Horn eitt gott stað, um tú vilt kaga upp í himmalin, tí býlingurin, sum er hin ovasti í landinum, er avbyrgdur frá øllum øðrum ljósi í býnum.

Tórshavnar kommuna hevur, saman við Pól Jespersen, gjørt eitt stórt kort, ið sýnir stjørnuhimmalin yvir Føroyum, og sum verður borið í hvørt hús í kommununi í hesum døgum.

Árið 2009 er lýst at vera altjóða stjørnufrøðiár, tí at tað í ár eru 400 ár liðin, síðan stjørnufrøðingurin Galileo Galilei setti kikaran fyri eygað og byrjaði miðvíst at granska stjørnuhimmalin.



*Norðlýsið yvir Tórshavn. Tórshavnar kommuna hevur gjørt av, at hon skal taka lut í Earth Hour 2009. Hetta merkir at gøtuljós verða sløkt í ein tíma í miðbýnum og á Norðasta Horni*
*(mynd: Ólavur Frederiksen)*

ATLANTIC AIRWAYS

# Ársaðalfundur í P/F Atlantic Airways

## Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Atlantic Airways hósdagin 2. apríl kl. 17:00 á 62N Airport Hotel (Hotel Vágar) í Sørvági

**Dagsskrá**

1. **Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra**
2. **Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna ári**
3. **Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar**
4. **Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið ella tap sambært góðkenda roknskapinum skal verða nýtt**

   Nevnd felagsins mælir til, at útgoldið verður vinningsbýti til partaeigarar felagsins við 5 mió. kr. - svarandi til kr. 4,830917874 pr. partabræv á kr. 100.

5. **Uppskot um viðtøkubroytingar**

   a) Vinnumálaráðið hevur sent nevndini uppskot til broyting í § 15 í viðtøkum felagsins. Endamálið við broytingini er, at aðalfundurin skal velja 4 nevndarlimir. Sambært uppskotinum verður § 15, stk. 1 soljóðandi: "Aðalfundurin velur eina nevnd, sum hevur 4 limir.

   b) Nevndin skýtur upp broyting í § 5, 1. punktum í viðtøkunum, soleiðis at innkallingarfreistin til aðalfund verður í mesta lagi 28 dagar og í minsta lagi 8 dagar. § 5, 1. punktum fær eftir uppskotinum hetta orðaljóð: "Nevndin í felagnum gevur í fyrsta lagi dagar 28 dagar og í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin boð um fundin, við útgreinan av tíð, og stað og fundarskrá.

6. **Val av nevndarlimum**

   Sbrt. grein 15 í viðtøkum felagsins skal aðalfundurin velja eina nevnd, sum hevur 3 limir. Limir nevndarinnar verða valdir fyri eitt ár í senn. Um uppskotið undir punkt 5 verður samtykt, skulu veljast 4 nevndarlimir.

7. **Val av grannskoðara**

   Nevndin mælir til afturval av grannskoðara felagsins, Rasmussen & Weihe, Løggilt grannskoðanarvirki P/F, Hoyvíksvegur 5, 100 Tórshavn.

8. **Uppskot frá partaeigara um at viðgera viðurskiftini millum høvuðspartaeigaran og privatu partaeigarar felagsins.**

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum**

Atgongumerki og atkvøðuseðlar skulu bíleggjast á telduposti ir@atlantic.fo ella á høvuðsskrivstovu felagsins á telefon 341030. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerki og atkvøðuseðlum er fríggjadagin 27. mars kl. 16:00. Atkvøðurættur kann fremjast við skrivligari fulltrú.

Við bílegging av atgongumerki og atkvøðuseðlum skal førast prógv fyri, at viðkomandi er partaeigari. Fyri partaeigarar hvørs partabrøv ikki eru skrásett við navni, verða útgivin atgongumerki og atkvøðuseðlar ímóti ávísing av eini í mesta lagi 5 daga gamlari útskrift frá Værdipapircentralen A/S ella frá tí kontoførandi peningastovninum (depotstaðið), sum skjalprógv fyri partabrævaognini. Við útskriftini skal fylgja skrivlig váttan fyri, at partabrøvini ikki eru ella verða avhendað til onnur áðrenn aðalfundurin er hildin.

**Aðalfundurin**

Í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin verða fundarskrá og øll uppskot til fundin løgd fram til gjøgnumlestur á høvuðsskrivstovu felagsins.

Partaeigari, sum sambært partabrævabókini kann prógva við skrásettum partabrævi, at hann er partaeigari, hevur atgongd til og atkvøðurætt á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammanundan hevur biðið um atgongumerki. Atkvøðurættur kann fremjast við skrivligari fulltrú.

Partaeigari felagsins hevur eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 100, hann eigur í partapeningi. Fyri at at geva atkvøðurætt krevst, at partabrøvini eru skrásett í partabrævabók felagsins, áðrenn aðalfundurin verður hildin.

Allar avgerðir á aðalfundinum verða tiknar við vanligum meiriluta av atkvøðum, um ikki annað er ásett í galdandi partafelagslóg.

Uppskot um broytingar av viðtøkum felagsins kunnu bert samtykkjast, um uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av greiddum atkvøðum á tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**Rindan av vinningsbýti**

Vinningsbýti verður útgoldið til partaeigarar, sum eru skrásettir í partabrævabókini, tá aðalfundurin, sum hevur samtykt vinningsbýti, verður hildin. Skrásetingardagurin (Record day) hjá VP er 7. apríl. Handil við partabrøvum uttan rætt til vinningsbýti byrjar 3. apríl. Vinningsbýtið vil, sambært galdandi reglur og siðvenjum, verða útgoldið mikudagin 15. apríl til ta avlopskonto í einum peningastovni, sum er skrásett í Værdipapircentralen sum ein konta, har gjaldast kann til við frígerandi virkningi.

P/F Atlantic Airways

Nevndin